HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

P/F Sveipur
Postrúm 2037
FO-165 Argir

Tórshavn, hin 11. desember 2002
Málnr.: 612-2001000384-14
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: HE / 35 64 25

# UMHVØRVISGÓÐKENNING
# AV KASSAVIRKINUM
# HJÁ P/F SVEIPUR


1. Heimild .................................................................... 2

2. Umsóknin ................................................................ 2
   2.1 Av viðkomandi tekningum eru: ...................... 2
   2.2 Av øðrum viðkomandi upplýsingum eru: ....... 2

3. Lýsing av virkinum .................................................. 3

4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum ........................... 3

5. Málsviðgerð ............................................................ 4

6. Góðkenningartreytir ................................................. 4
   6.1 Innrætting og rakstur ....................................... 4
   6.2 Luft, luktur og ljós ........................................... 4
   6.3 Óljóð og ristingar ............................................ 5
   6.4 Spillvatn ........................................................... 5
   6.5 Kemikaliugoymsla ............................................ 5
   6.6 Burturkast ........................................................ 5
   6.7 Óhapp ............................................................... 6
   6.8 Innaneftirlit ....................................................... 6
   6.9 Rakstrarskráseting og umhvørvisfrágreiðing .. 6

7. Alment ...................................................................... 6

8. Kæruvegleiðing ........................................................ 7



Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: feagency@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

**UMHVØRVISGÓÐKENNING**
**AV KASSAVIRKINUM**
**HJÁ P/F SVEIPUR**

## 1. Heimild

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann veita umhvørvisgóðkenning til kassavirkið hjá P/F Sveipur á Argjum, V-tal 378984.

Umhvørvisgóðkenningin verður givin við teimum treytum, sum eru lýstar í partinum um "Góðkenningartreytir" niðanfyri, og upplýsingum, ið eru móttiknar saman við umsóknini.

## 2. Umsóknin

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk tann 23. november 2001 umsókn um umhvørvisgóðkenning frá P/F Sveipur á Argjum.

Saman við umsóknini eru móttiknar tekniskar upplýsingar um virksemið og útleiðingar, umframt kort, sum sýna staðsetingina og innrættingina av kassavirkinum.

Formateret: Punktopstilling

### 2.1 Av viðkomandi tekningum eru:

- Matrikulkort fyri Matr. nr. 43h á Argjum (Akt 5).
- Síðumyndir og skurður í bygningi (Akt 5, tekn. nr. 004 B og S001).
- Støðumynd yvir framleiðsluhøll (Akt 5, tekn. nr. 002 c og 002 d).
- Innrætting av bygningi - støðumynd (Akt 5).
- Staðseting og prosessdiagram yvir útbúnað (Akt 5).
- Støðumynd kloakk (Akt 5, tekn. nr 300B).
- Skurður í bygningi (Akt 5, tekn. nr. 006).

Formateret: Punktopstilling

### 2.2 Av øðrum viðkomandi upplýsingum eru:

- Byggisamtykt fyri økið ( Akt 5).
- Yvirlit yvir ljóðkeldur (Akt 5).
- Databløð fyri Styrochem eps (Akt 5 og 12).
- Upplýsingar frá P/F Shell um útlát av pentan.
- Sertifikat frá P/F Sveipur og StyroChem fyri kassar (Akt 5)
- Upplýsingar um útleiðingar til luft og áseting av hædd á útleiðingum o.ø. (Akt 12)
- Databløð fyri HYDRO-X ketilsteinsvesku. (Akt 12)
- Datablað fyri XAS 96 Dd/ Atlas Copco, dieselriknum luftkompressara. (Akt 12)

## 3. Lýsing av virkinum

Virkið verður staðsett á matr. nr. $43^h$ á Argjaboðagøtu á Argjum í Tórshavnar kommunu.

Kassavirkið hjá P/F Sveipur framleiðir flamingokassar til ali- og fiskivinnuna. Árliga nýtslan av rávøru er 200-300 tons av *polystyren*-kúlum, útrokningarnar verða gjørdar út frá eini rávørunøgd upp á 300 tons. Harumframt er nýtslan av olju til at framleiða vatndamp umleið 200.000 litur um árið.

Framleiðslan av flamingokassum fer fram á tann hátt, at rávøran, sum er polystyren-kúlur, fyrst verður forskúmað og síðani goymd í tangum. Frá goymslutangunum verða kúlurnar leiddar í kassamaskinur umvegis ein trýstfyllara.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Framleiðsla av flamingo hevur við sær útleiðing av *pentan* frá framleiðsluni av kassum, umframt roykgass frá dampketli og frá dieselriknum luftkompressarum.

Hæddin á útleiðing av pentan er ásett sambært "Vejledning nr. 6 fra Miljøstyrelsen" frá 1990. Hesin háttur er sera einfaldur og tekur ikki hædd fyri føroyska landslagnum og veðurlíkindum, men kann kortini nýtast sum vegleiðing, tá ið støða skal takast til luftútleiðingar. Hæddin á útleiðingini er grundað á B-virðið fyri *pentan,* ið er 1 $mg/m^3$. B-virðið er hægst loyvda ískoyti frá einstøkum virki til umhvørvið, B-virðið skal til eina og hvørja tíð verða hildið.

Við nýtslu av *nomogram*-háttinum verður hæddin á *pentan*-útleiðingunum ástøðiliga ásett til 7,5 metur yvir lendið. Útleiðingin hjá virkinum er staðsettur á takinum, ið er 8 metur yvir lendið.

Hæddin á útleiðingini av roykgassi frá dampketli er ásett sambært "Vejledning nr. 6 fra Miljøstyrelsen", kap. 4.6, um "Mindre fyringsanlæg".

Útleiðing frá dampketli er ásett til 10 metur yvir lendið. Hæddini á útleiðingini er 13 m yvir lendið.

Útleiðingin frá luftkompressarum er við jørðildið. Hesir skulu tó halda krøv samsvarandi donsku "BEK nr. 667 af 14/09/1998 *Bekendtgørelse om begrænsning af luftforurening fra mobile ikke-vejgående maskiner".*

Av øðrum viðurskiftum av umhvørvisligum týdningi kunnu nevnast, at virksemið hjá kassavirkinum hjá P/F Sveipur fer at hava við sær nakað av óljóði, spillvatni og burturkasti. Hædd verður tikin fyri hesum í treytunum í góðkenningini.

## 5. Málsviðgerð

Grundarlagið undir málsviðgerðini eru fyrst og fremst tær upplýsingar, sum eru móttiknar í omanfyri lýsta tilfari.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á hesi viðurskifti:

- At luftútleiðingin frá virkinum verður gjørd á eini hædd, sum er mett at vera umhvørvisliga trygg.
- At ljóð- , lukt- og dustampar ikki standast av virkseminum.
- At útleiðing av spillvatni skal vera sambært galdandi reglum, ella vegleiðing frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av fylgjandi ásetingum:

Formateret: Punktopstilling

### 6.1 Innrætting og rakstur

6.1.1 Økið, ið hoyrir til virkið, skal vera týðiliga merkt og haldast ruddiligt og reint.
6.1.2 Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á virkinum.
6.1.3 Starvsfólkini skulu vera kunnug við innihaldið í hesi góðkenningini.
6.1.4 Øll øki, ið hoyra til virkið, har møguleiki er fyri, at kemisk evni so sum olja kunnu leka, skulu vera úr tøttum tilfari.
6.1.5 Virkið skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar altíð verða hildnar.
6.1.6 Virkið hevur skyldu til altíð at nýta bestu tøku tøknina (BAT[1]) fyri at minka mest møguligt um øll útlát, og skal tøka reinsiútgerðin altíð nýtast til fulnar. Virkið skal halda øll útlát so lág sum gjørligt fyri at avmarka dálkingina mest møguligt. Tey kemikaliu, ið nýtt verða, skulu hava minst møguligt árin á umhvørvið.
6.1.7 Undir arbeiði, har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum.

### 6.2 Luft, luktur og ljós

6.2.1 Virksemið má ikki verða atvoldin til royk-, lukt- ella dustampar uttanfyri økið hjá virkinum.
6.2.2 Útleiðingin av *pentan* skal vera minst 8 metrar yvir lendið.
6.2.3 Útleiðingin frá dampketli skal vera minst 13 metrar yvir lendið.
6.2.4 Útleiðingarluft má í mesta lagi innihalda 20 mg av dusti pr. $Nm^3$.
6.2.5 Útleiðingarnar skula vera innrættaðar soleiðis, at sýni kunnu takast av útleiðingarluftini.
6.2.6 Øll útleiðing til luftina skal vera uppeftirrættað.
6.2.7 Um Heilsufrøðiliga starvsstovan ynskir tað, skulu sýni takast av útleiðingarluftini, um neyðugt verður at meta um útlátini.
6.2.8 Um ampar verða av dusti, lukti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.
6.2.9 Nýtsla av ljósum á virkinum skal vera soleiðis, at hetta ikki hevur við sær ampa.

Formateret: Punktopstilling

[1] Best Available Technology.

## 6.3 Óljóð og ristingar

6.3.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) frá virkinum, fer upp um niðanfyri standandi mørk máld við næsta grannamark, á nevndu økjum og tíðarskeiðunum:

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mána. - fríggja. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mána. - fríggja. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnaøki, har meira larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnaøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

Tað mestloyvda óljóðstøðið frá virkinum mált innandura í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini.

6.3.2 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av ristingum.

**Formateret:** Punktopstilling

6.3.3 Um ampar verða av ristingum, lágfrekventum óljóði ella infraljóði, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.

## 6.4 Spillvatn

6.4.1 Vaskivatn skal leiðast ígjøgnum brunn, har møguleiki skal vera fyri at taka spill av flamingo burturúr, áðrenn spillvatnið verður leitt í kommunalu spillvatnsskipanina.

6.4.2 Frárenslvatnið má ikki bera brá av olju ella aðrari dálking. Oljuinnihaldið í spillvatninum má í mesta lagi vera 10 mg/l, kannað sambært DS/R 208.

6.4.3 pH í frárenslvatninum frá virkinum skal vera 6,5 – 9,0.

6.4.4 Spillvatn frá vesum skal leiðast í rottanga.

6.4.5 Innan 1. juli 2003 skal kølivatn leiðast í lokaðum røri beinleiðis í sjógv út á eitt dýpi, sum altíð er undir á hægstu fjøru.

## 6.5 Kemikaliugoymsla

6.5.1 Undir goymsluni av kemikalium skal vera kar til at taka ímóti møguligum lekum ella spilli.

6.5.2 Rúmdin á karinum skal vera størri enn rúmdin á tí størsta kemikaliudunkinum.

6.5.3 Goymslan skal vera vard móti vindi og regni.

6.5.4 Goymsla til kemikaliu skal vera læst fyri óviðkomandi.

## 6.6 Burturkast

6.6.1 Alt húsarhalds- og virkisburturkast skal viðgerast í samsvari við galdandi lóggávu. Í løtuni er kunngerð um burturkast galdandi, nr. 147 frá 19. oktober 1995.

6.6.2 Burturkastið skal latast góðkendum móttakara, og tað skal skiljast sundur sambært ásetingum frá móttakara.

### 6.7 Óhapp

6.7.1 Henda óhapp, sum hava dálking við sær, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk, so sum upprudding, avmarking og fyribyrging, til eitt støði, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Størri óhapp skulu so skjótt sum gjørligt fráboðast til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

### 6.8 Innaneftirlit

6.8.1 Kanningar sambært góðkenningartreytunum kunnu verða umbidnar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
6.8.2 Øll sýnistøka og meting av úrslitum verður goldin av virkinum.
6.8.3 Øll sýnistøka skal gerast av felag, sum er góðkent av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
6.8.4 Øll sýnistøka skal gerast, meðan framleiðslan er í fullari gongd.
6.8.5 Víðkað kanningarskrá kann í serligum føri verða umbiðin av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

### 6.9 Rakstrarskráseting og umhvørvisfrágreiðing

6.9.1 Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:
a. Nøgdir av allari brúktari rávøru.
b. Úrslit av kanning av oljufýri og luftkompressarum.
c. Avhendaðar nøgdir av vandamiklum burturkasti, herundir spillolju.

Formateret: Punktopstilling

6.9.2 Skrásetingarnar skula vera á staðnum, og eftirlitsmyndugleikin skal kunna síggja tær eftir umbøn. Skrásetingarnar skula goymast í 5 ár.
6.9.3 Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingunum og frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, tulking av kanningarúrslitum, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk, skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuna í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

## 7. Alment

- Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.
- Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
- Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.
- Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.
- Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:
  1) nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin.
  2) dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
  3) dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.
- Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 8. Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til Føroya landsstýri. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Føroya landsstýri við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Vinarliga

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Arbeiðseftirlitið, Postrúm 1134, FO-100 Tórshavn
Føroya landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-100 Tórshavn
Føroya landfúti, Postrúm 3018, FO-110 Tórshavn
Tórshavnar kommuna, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu, FO-350 Vestmanna